LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

FORD MONDEO TIL SØLU
1,8l, aut. árg. 1994, koyrt 81.000 km. Bilurin er í góðum standi. Sýnaður í januar í ár og kammreimin er skift fyri stuttum. Spildurnýggj summardekk á alufelgum eru undir bilinum, og næstan nýggj vetrardekk á felgum kunnu fylgja við.
Tlf. 319325 ella 253205

PÍKADEKK
Fýra píkadekk 175/65 R14 á stálfelgum. 4 hol (100 mm millum hol) passa til m.a. Opel Astra o.fl. til søluverði 1.500,- kr.
Tlf. 448764

PÍKADEKK YNSKJAST
Fýra píkadekk til Ford Mondeo árg. 98 ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 448764

SONY BILSTEREO
Sera flott til søluverði 1.400 kr. 4 x 50 w.
Tlf. 448764

TAKBOYLAR
Originalir takboylar til Opel Astra, Vectra og Omega st. car v/ rail til søluverði 500,- kr. (Nýprísur 1000,- kr).
Tlf. 448764

TIL SØLU
Fýra píkadekk 165/80 R13 á felgum til søluverði kr. 1500,-
Tlf. 316817/216440

OPEL VECTRA TIL SØLU
Ein Opel Vectra DTI 1.6 árg. 09/2000, koyrt 70.000 km til søluverði. Bilurin er í finasta standi og sýnaður í sept. 03.
Tlf. 257591

PEUGEOT 307 2.0 HDI
(diesel) árg. 11/2001, koyrt 63.000 km til søluverði um hóskandi boð fæst. Hevur aircondition, alu-felgur, fløguspælara sum eykaútgerð. Píkadekk á felgum fylgja við. Verður seldur vegna keyp av vørubili. Prísuppskot: 145.000,-
Tlf. 215126

PÍKADEKK
4 Firestone píkadekk til søluverði 2.000 kr. Stødd 175/65-R14. Eru bara brúkt í ein vetur.
Tlf. 318738/218201

FELGUR
Fýra originalar Toyota-felgur 14" við summardekkum til søluverði.
Tlf. 314347

HONDA CIVIC 1.4
koyrt 83.000 km, myrkabláur, 2 hurðar, árg. 10/97. Sera vælhildin, nýggja kamreim, nýggjan fløguspælara.
Tlf. 213199

FORD ESCORT ST. CAR
Myrkareyður Ford Escort, st. car til søluverði. Bilurin er frá nov. 96 og sær gott út.
Tlf. 269603

TIL SØLU
4 píkadekk v/felgum til ein Daihatsu Charmant 1.6, umframt forhjelmur, baklúka og lyktir til søluverði.
Tlf. 281226

BILUR TIL SØLU
Nissan Sunny 2000 diesel, 4 nýggj vetrardekk, radio við cd-spælara, nýggj kammreim, bíliga til søluverði.
Tlf. 215626

TIL SØLU
4 stálfelgur 5 x 13, 4 píkadekk 155/80 R13, 4 ventilar. Passar til Citroen Saxo, kr. 2.000,-
Tlf. 444771

TOYOTA AVENSIS
árg. 98, liftback, grønur, í góðum standi, til søluverði 110.000 kr.
Tlf. 268469/513269

VOLVO 440 TIL SØLU
sum eykalutur, árg. 90. Prísur 3.000 kr.
Tlf. 742119

GTI MOTORUR
Motorur til Peugeot 206 GTI, árg. 1999, 170 HK, koyrt 80.000 km, við skaða, bíliga til søluverði.
Tlf. 212447

TOYOTA COROLLA
árg. 95, koyrt 140.000 km, 17" alusportfelgur, tónaðar rútar, sær gott út, til søluverði. Prísuppskot kr. 70.000,-
Tlf. 322800 ella 223143

OPEL ASTRA
st.car, diesel, árg. 1992 bíliga til søluverði.
Tlf. 316005/516005

DEKK
Fýra sera góð heilársdekk á felgum til Mazda 323, árg. 1980 fáast bíliga.
Tlf. 215157

EIN AUDI 100 2.5 TD
Árg. 94, hevur sóltak og automatisk gear. Ein viðfestivognur, til søluverði.
Tlf. 270606

EIN TOYTA COROLLA 1.6
typa AE 87, árg. 86, koyrir fínt og ein viðfestivognur, bíliga til søluverði.
Tlf. 270606

HONDA ACCORD
árg. 87, sum eykalutir, hurðar, motorur, gearkassi o.a.
Tlf. 228347

TOYOTA CAMRY
árg. 86, til søluverði 10.000 kr. Koyrt 300.000 km.
Tlf. 228774 eftir kl. 15

VW GOLF II
ynskist til eykalutir. Prísur: 1.000,-
Tlf. 421011/210311

VOLVO 360
árg. 1986, sýnaður 16.06.03 til søluverði.
Tlf. 423348/217348

NISSAN PICK UP
árg. 1986, sýnaður 2.6.03 til søluverði.
Tlf. 423348 ella 217348

VW CARAVELLE TIL SØLU
(transportari við setrum aftan) 2.4 Diesel, skrásettur sum persónbilur, árg. 01.93, 234.000 km, sýnaður 02.06.03 í góðum standi.
Tlf. 422681/225418

TOYOTA LANDCRUISER
til søluverði, árg. 86, sýnaður 2003 30.9. Koyrir gott og riggar sum hann skal, ring og hoyr nærri.
Tlf. 226880

AUDI 100
TD, árg. 87, til søluverði sum eykalutir.
Tlf. 421059

BÍLIGUR BILUR
Daihatsu Charade TS, árg. 89, koyrt 199.000 km, motorurin hevur koyrt uml. 140.000 km. Sýnaður 24.02.03 koyrir væl. Til søluverði 5.000,-
Tlf. 508064 ella 441995 eftir kl. 17

TIL SØLU
Ein hvítur Toyota HiAce diesel vøruvognur.
Tlf. 424363 ella 221029

TIL SØLU
BMW diesel bilur, árg. 30.12.86 í sera góðum standi. Ring og hoyr meiri.
Tlf. 220955

OPEL OMEGA TIL SØLU
fyri 8.000 kr. Bilurin hevur skaða, men koyrir gott, annar bilur fylgir við til eykalutir.
Tlf. 519726

PEUGEOT 205 19 GTI
vælhildin og sær gott út, til søluverði um hóskandi boð fæst.
Tlf. 228334

PÍKADEKK
Fýra lítið brúkt píkadekk við felgum, fýra hol, til søluverði fyri 1.800 kr.
Tlf. 554554

FORD CAPRI 2.8 V6-79
Motorur koyrt 60.000 kr, koyrir vael, skal sýnast. Prísur 5.000 kr ella hægsta boð.
Tlf. 221910 ella 421255

TIL SØLU
2 lastvognar - 1 Scania 112 6x2 við blanditrumli, 1 Scania 112 6x4, dumpari.
Tlf. 210452

MOTORUR YNSKIST
Motorur til ein Nissan Sunny SL. 1.6 (N 13) frá 1988 ynkist til keyps. Ring á
Tlf. 510542

MERCEDES 309
Lastbilur til søluverði uttan plátur.
Tlf. 372123 ella 504096

TIL SØLU
Ein Toyoita Carina II 2.0XLi, árg. okt. 1992 til søluverði. Hevur koyrt 139.000 km. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 221855

HONDA ACCORD 2.0 CA5
Árg. 87 til søluverði sum eykalutir.
Tlf. 310717 ella 510717

TOYOTA STARLET
Árg. 85 (ongar nr. plátur) til søluverði fyri 2.500 kr.
Tlf. 421430

SUBARU 1.6 DL
Árg, 89 til søluverði sum eykadeilir. Nógvir deilir fylgja við, Bilurin hevur góðan motor.
Tlf. 332086

2 VIKING SUMMARDEKK
Stødd 205/55 ZR 16, næstan nýggj til søluverði fyri 600 kr.
Tlf. 332296 ella 222498

TIL SØLU
Toyota Carina, árg. 3/96 til søluverði. Bilurin er í sera góðum standi. Hevur el-sóltak.
Tlf. 449040 ella 258353

17'' FELGUR
Merki: BSA 'Chrome'felgur, std. 205/14-17''. Hol: 4x108mm. Passar til Peugeot/Citroen, 3 mán. gamal. Prísur: 7.800 kr.
Tlf. 217747

TIL SØLU
um hóskandi boð fæst. Ein BMW 728i automatik. Bilurin er 5 ár, hevur klimaanlegg og m.a. Ring
Tlf. 217543

4 FELGUR
við píkadekkum,1 ára gamlar, til søluverði. Passa til Kia Pride. Kr. 4.000.
Tlf. 508531

NISSAN MICRA
árg. 92, koyrir vael, bíliga til søluverði.
Tlf. 227752

Amboð

AMBOÐ
Snikkarabonkur, av gamla slagnum. Lítið og onki brúktur, til søluverði fyri 5.000 kr.
Tlf. 310039 eftir kl. 18:00

HØVIL
Tjúktarhøvil og rundsag í einum til søluverði fyri 2.000 kr.
Tlf. 447371

TIL LEIGU
3.5T beltimaskina til leigu, við ella uttan førara, sámuligur prísur.
Tlf. 218101

Arbeiði

TIMBURMAÐUR SØKIST
til smáumvæling skjótast tilber.
Tlf. 311045

ER TAÐ NAKAR
ið hevur brúk fyri reingerðingshjálp nakrar tímar um vikuna, so ring til mín. Eg eri ein 29 ára gomul kvinna, má vera í Havn.
Tlf. 318775/257966

ÚTRÓÐRARBÁTUR
Er tað nakar, sum manglar ein mann við sum avloysara, helst úr Klaksvík.
Tlf. 269909

ARBEIÐI SØKIST
21 ára gomul genta, ið hevur koyrikort til lastbil og trailara søkir arbeiði skjótast gjørligt. Alt hevur áhuga.
Tlf. 260434

ARBEIÐI SØKIST
16 ára gamal drongur søkir arbeiði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 507105 ella 422177

Barnaansing

23 ÁRA GOMUL
mamma ynskir at ansa einum barni uml. 20 tímar um vikuna, helst fyrrapart.
Tlf. 315609/262581

GENTA/KONA
søkist, at ansa Rannvu, sum er 18 mðr. Vinarliga ring
tlf. 321441 ella 321551

BARNAGENTA SØKIST
til at ansa 2 børnum 3 og 9 ár, nøkur kvøld um mánaðin.
Tlf. 319265

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Brio koyristólur til søluverði fyri kr. 800,-
Tlf. 316817/516817

SCANDIA KOYRISTÓLUR
myrkablátt betrekk uttan kalesju, eitt lambaskinn, myrkablá parasol, stálkurv undir, innkeypsnet (blátt) + bláur paraplyklapvognur, selist alt fyri tilsamans 1.500,-
Tlf. 322850

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Ótrúliga gott tilboð! Sera lítið brúkt barnabrík + úttrekk + botn + madrassa. 1 ára gomul. Nýprísur 1.370,- nú bert 600 kr.
Tlf. 442119

MYRKABLÁUR BRIO
koyristólur við galesju til søluverði 1.000,- kr. Er í góðum standi.
Tlf. 319213

TIL SØLU
Tremmusong 60 x 120, bamsusong 70 x 170. Bamsusongin kann hálast út.
Tlf. 370025

TIL SØLU
Lítið brúktur Simo-koyristólur bíliga til søluverði, hevur alu-stell og lufthjól. Við fylgir koyriposi, regnslag, puslitaska og pumpa.
Tlf. 262685

TIL SØLU
Pusliborð við 4 skuffum, trægrulvigarður, bilstólur 0-9 mðr, bilstólur 6 mðr.-4 ár. Vognur/stólur við kalesju o.a.
Tlf. 317476

BLÁUR TVÍBURAVOGNUR
av merkinum Trille. Lítið brúktur, til søluverði fyri 3.500 kr. Svartur Silvercross vognur til søluverði 500 kr.
Tlf. 451015 ella 261528

TIL SØLU
1 bilbarnastólur Chicco 0-13 kg kr. 500,- 1 bilbarnastólur 0-10 kg kr. 400,-.
Tlf. 310039 eftir kl. 18:00

TIL SØLU
Combi-barnavognur við babylift, regnslagi og puslitasku til søluverði fyri 2000 kr. Ring
Tlf. 424116/724116

Bátaútgerð

BÁTUR YNSKIST
Glastrevjabátur ynskist. Prísur í mesta lagi 200.000 kr.
Tlf. 508503

TIL SØLU
Neyst og bátur + íbúð, sum er innrættað á neystalofti til søluverði, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 212118

19 TONS LÍNU- OG SNELLUBÁTUR
uuttan fiskiloyvi, við allari útgerð, bíliga til søluverði. Hevur nýggjan 6 syl., 225 HK Perkins motor. Ring og gev eitt boð.
Tlf. 226556 ella 216556

TIL SØLU
Eitt Bourg Varner gear 2, 91:1.
Tlf. 221519

FÝRAMANNAFAR
Eitt lítið gamalt vael viðfarið fýramannafar til søluverði – minstaboð 10.000 kr.
Tlf. 270644

GOGGUR
Goggur til søluverði.
Tlf. 227052

GLASFIBERBÅD
Glasfiberbåd med selvlænsende dæk købes, gerne uden fiskerettigheder.
Tlf. 449388

VÁTDRAKTIR
Tríggjar vátdraktir, vatnski og ein sleipipúta við endum til søluverði fyri 10.000,- kr.
Tlf. 226880

BÍLIGA TIL SØLU
Sailor 2047/RT144.
Kristen Friis, Vestmanna, tlf. 424068

BÍLIGA TIL SØLU
Ekkolodd (Humminbird).
Kristen Friis, Vestmanna, tlf. 424068

BÍLIGA TIL SØLU
Plottari (Shitmate) cp 32.
Kristen Friis, Vestmanna, tlf. 424068

TIL SØLU
Gott 4-mannafar, við ella uttan páhangsmotori, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 361776 ella 320470

Bingo

BINGO VERÐUR
í Mettustovu mánakvøldið 6. okt. kl. 19.
Kvinnufelagið

STÓRT SEYÐABINGO
verður í bygdarhúsinum í Kollafirði leygardagin kl. 16.00. 15 nýflett lomb verða at vinna. Veddað verður um vektina á einum tvævetursveðri.
Kollafjarðar Fornminnisfelag

MISSIÓNSHÚSIÐ Í SKÁLAVÍK
Eydnuhjól og fiskidammur verða leygarkvøldið og sunnukvøldið 4. og 5. oktober. Sera vakrir lutir eru at vinna.
Missiónshúsið

BINGO
Bingo verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 4. okt. kl. 18.00. Lamb á lutaseðli.
Eldrafelagið Borgin

BINGO
verður í Pálsstovu leygardagin 4. okt. kl. 15. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðli 2 x turt tjógv og 3 lomb. Bingola, eyka spæl, koyring heim.
Kiwanisfelagið Rósan

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 5. okt. kl. 16.00. full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur 1.500 kr. Eykaspælið 800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
Ársins seyðabingo hjá TBF verður í Skúlahøllini í Trongisvági mánakvøldið 13. okt. kl. 19.00. 16 lomb at vinna.
Tvøroyrar Borðtennisfelag

TVØROYRAR KLUBBI
Gott bingo verður í Tvøroyrar klubba leygarkvøldið 4. okt. kl. 20.
Nevndin

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 20. oktober kl. 19.00. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

TIL SØLU
Eitt bíbilleksikon 14 bind (sum nýtt) til søluverði fyri 1.500 kr. 8 bøkur av Árets begivenheder i billeder til søluverði fyri 1.000 kr.
Tlf. 270427 ella 342981

JUMBOBØKUR
Er tað nakar, sum hevur Anders And jumbobøkur at selja mær.
Ring 318016

Burturm. /funnið

FUNNIÐ
Eitt digital kamera funnið við bátahylin á Argjum. Vinarligast ring millum kl. 18-19.
Tlf. 312915

SERA TOM LJÓSAGRÁ
dvørgakanin við hangioyrum burturmist í Tvørgøtu 27. Hevur tú funnið ella sæð hana, vinarliga ring
tlf. 553355

GUITARUR
Eg havi sett ein guitar í svørtum posa frá mær onkrastaðni í Havn. Er tað onkur, sum veit um hann? Hann er reyðligur við eini sprekku í kassanum. Finnaraløn verður latin.
Tlf. 319604/250298, Bjarki

REYÐUR NYLONRYGGSEKKUR
horvin frá parkeringsplássi í J. H. Schrøtersgøtu, beint við SvF. Ryggsekkurin (40x25 cm) hvarv mánadag 22. september. Í honum eru skúlabøkur, pappír, kalendari o.a. Finningarløn: 500 kr.!
Birgit Remmel, J. H. Schrøtersgøta 10, tlf. 321001

HEVUR TÚ FUNNIÐ EIN GULLRING
við lítlari reyðari perlu, á Viðareiði, møguliga frá Salongini til handilin. Ringurin hevur nógv at týða fyri meg. Finningarlønin verður givin. Ring
Tlf. 317451, 265065 ella 451014

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð í Klaksvík ynskist til leigu skjótast gjørligt.
Tlf. 258664

YNSKIST TIL LEIGU
Íbúð/hús ynskist til leigu í Havn.
Tlf. 262620

HÚS Á TVØROYRI
Nýumvæld hús á Tvøroyri til sølu ella í umbýti við størri hús.
Tlf. 372138/269828 eftir kl. 18

HÚS Í KLAKSVÍK
Um hóskandi boð fæst, eru húsini á Bumshamarsvegi 29 til sølu.
Tlf. 456749

ÍBÚÐ YNSKIST
27 ára gamal maður søkir íbúð í Havn fyri uml. kr. 3.000,- Hevur fast arbeiði.
Tlf. 210726

FRAMLEIGA YNSKIST
av íbúð í Keypmannahavn. Verkfrøðingir ynskir framleigu av íbúð í Keypmannahavn í tíðarskeiðinum uml. 13. oktober og 4 vikur fram.
Tlf. 210289 ella teldupost jmj@att.fo.

LEJLIGHED I SPANIEN
Lejlighed i bjerglandsby nær Malaga til leje. Pris 2.500 pr. uge. Ring for nærmere oplysninger.
Tlf. 322217 eller 0034 952553427

HÚS/STÓR ÍBÚÐ
ynskist í Tórshavnar umráðnum av friðaligum fólkum, sum ikki roykja. Max. 6.000 kr.
Tlf. 224910/317865

UNGUR MAÐUR
søkir íbúð í Eysturoynni til at flyta í um árskiftið. Gjarna nær við Gøtu, men alt hevur áhuga.
Vinarliga ring 262009

HÚS TIL SØLU
Eldri hús á Tróndabrekku 8 í Fuglafirði til sølu.
Tlf. 744679 eftir kl. 17

MIÐALSTÓR HÚS Í SANDAVÁGI
til leigu frá 6. okt. Prísynski 5.000 kr.
Tlf. 333933

ÍBÚÐ TIL LEIGU
til tilkomið fólk frá 1. ella 15. okt. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1682

TIL LEIGU
Kamar í vesturbýnum til leigu við atgongd til vaskimaskinu, bað og tekøk.
Vinarliga ring 314765

TVÍHÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, eru eini tvíhús í Tórshavn til sølu.
Tlf. 218334

HÚS TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, eru eini sethús á Argjum við góðum útsýni til sølu. Húsini eru 90 fermetrar í trimum hæddum grundkið er 1133 fermetrar. Møguleiki er fyri at sundurbýta okið til dømis eini dupulthús. Kjallaraíbúð: Stova/køkur, tvey kømur, baðirúm og gongd. Á miðhæddini eru tvær stovur, køkur, baðirúm, barnakamar og hjúnarúm. Á loftinum eru innrættaði tvey kømur. Áhugaði kunnu skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1681

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu, fyri rímiligan prís. Helst í Streymoy. Vit eru eitt par við einum barni, sum fegin vilja flyta til Føroyar, umleið 1. desember ella skjótast gjørligt eftir hetta. Vit eru friðarlig, fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 0045 35855545. Mob.0045 22453382

ÍBÚÐ YNSKIST
Einlig mamma til 1 ára gamlan drong leitar eftir íbúð í Klaksvík. Royki og drekki ikki.
Tlf. 455519, Margretha

ÍBÚÐ SØKIST
24 ára gomul mamma við einum barni søkir íbúð í Havn. Havi fast arbeiði, max 3.800,- v/ ljós og hita. Vinarliga ring
Tlf. 264948

HEY
Vit eru eitt par við einum barni, sum søkja íbúð í Eysturoynni skjótast gjørligt. Fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 269329

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í KBH NV
Íbúð í KBH NV til leigu frá 1. nov. 2003 til 1. juni 2004. Skriva til peturwd@hotmail.com ella ring
Tlf. 20943698

ÍBÚÐ YNSKIST
Tveir 25 ára gamlir mans sóknast íbúð, við stovu og tveimum kømrum, í Tórshavn. Vit hava báðir fast starv og gjalda til tíðina. Fara væl um. Ring til
Tlf. 229713 ella 507870

ÍBÚÐ Í SØBORG (NÆR KBH)
3 rúms íbúð til leigu í Søborg fyri 7.500 kr. um mánaðin v/ øllum. Vinarliga ring
Tlf. 0045 25375441 Friðálvur

HÚS/ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Vági. Ring til
Tlf. 743159

KAMAR TIL LEIGU
frá 1. okt. Kost. 2.500 kr. um mán. Depositum 1 mán. leiga.
Rlf. 314757 ella 258868

UNGT PAR VIÐ EINUM BARNI
søkir íbúð ella lítil hús til leigu í Eysturoynni ella í Sundalagnum. Vit fara væl um og gjalda til tíðina.
Tlf. 441908 ella 741908

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes E-postur: debes@post.olivant.fo
Tlf. 311197-211192

Dansur

GULLDANSUR Í HVALBA
Leygardagin 4. oktober endar landskappingin í fótbólti og nú Royn hevur vunnið kappingina og sostatt flytur upp aftur í 2. deild, verður gulldansur Roynhøllini hetta sama kvøldið. Driv spælir góðan dansitónleik.
Royn

Dýr

KETTLINGAR
2 sera fittir kettlingar verða latnir. Føddir 21. juli. Ein svartur/hvítur og ein gráur/hvítur. Heldir lodnir.
Tlf. 314546 ella 211424

AKVARIUM
Eitt 40 l. akvarium við hitalikami, pumpu og steinum til søluverði fyri 500,- kr.
Tlf. 424025 ella 263802

KETTLINGUR
Ein sera fittur, reinligur kettlingur verður latin, bert til djóravin.
Tlf. 444526

MARSVÍN
brún + hvít, 5 ungar, til søluverði fyri 80 kr.
Tlf. 226575, í Havn

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Fittir hárleysir hundahvølpar undan Chinese Crested/gravhundi. Best eftir kl. 17.
Tlf. 311490

PUDDIL YNSKIST
Puddilhvølpur (helst tik) ynskist. Vinarliga ring eftir kl. 15.30.
Tlf. 317839/224656

SERA TOM
ljósagrá dvørgakanin verður burtur í Tvørgøtu. Hevur tú sæð ella funnið hana, vinarliga ring
tlf. 553355

KETTLINGUR YNSKIST
Hvítur ella gráur kettlingur ynskist.
Tlf. 319265

HYGG HER!
Hundur verður latin djóravini. Ring og hoyr nærri, best aftaná kl. 18.
Tlf. 422978 ella 722978

FITTIR KETTLINGAR
Vit eru 3 fittir kettlingar, ið fegnir vilja hava eitt heim, vit eru undan vilkettu og eiga ongan góðan.
Tlf. 507959/504014

GÆS-DUNNUR TIL SØLU
6 gásapør fyri 600 kr. parið, 9 dunnur fyri 1.600 kr. allar, ella 200 kr. stk. 14 dunnuungar 16 vikur gamlir 200 kr. stk. lívandi.
Tlf. 255028 ella 265627

KETTLINGAR
4 sera fittir kettlingar verða latnir djóravini, 3 hvítir, 1 reyður, eru 5-6 vikur gamlir.
Tlf. 449035 eftir kl. 17.00

DVØRGHAMSTRARAR
2 dvørghamstrarar til søluverði fyri 50 kr. stk.
Tlf. 319218

SPAKUR ÍSLENDSKUR HESTUR
til sølu, við ella uttan tilhoyr, s.s. saðil, el-hegn o.a. Ring á
Tlf. 220120 ella 332083

Húsarhaldstól

PIZZARIAOVNUR TIL SØLU
Ein pizzariaovnur av merkinum »Blodgett« bíliga til sølu.Stødd 90x100 cm.
Tlf. 228582

MIKROOVNUR
Sharp mikroovnur til søluverði fyri 1500 kr.
Tlf. 533491

KAFFIMASKINA
Philips kaffimaskina til 12 koppar, 400 kr.
Tlf. 316649 eftir kl. 18

VASKIMASKINA TIL SØLU
Góð Gorenje vaskimaskina selist fyri 2.500 kr. Hon er 2 1/2 ára gomul og tekur 5 kg av klæðum.
Tlf. 310996 e. kl 17, eisini 219083

KØLISKÁP
Vestfrost køliskáp BSFS225 til sølu, frá 1999 (A) super lágorka við 22° brúkar tað 225 KwH um árið H:125 B:60 D:60 cm, nýprísur er 6.595,-. Til sølu vegna keyp av minni skápi.
Tlf. 447071/213376

Innbúgv

BOXMADRASSA
Vælhildin bosmadrassa stødd 1.40 við »gavli« til sølu.
Tlf. 311688 eftir kl. 18

YMIST TIL SØLU
Vitrineskáp, sjónvarpsborð, bøkur, sofaborð, stell og annað. Kann siggjast leygardagin frá kl. 10-20.
Høvdagøta 10, Argir

YNSKIST
Ein telefonbonkur v/ skuffum úr oljubehandlaðum furutræið.
Tlf. 514797

HORNASOFA
Grá hornasofa til sølu fyri kr. 5000,- Nýprísur 10.000 kr. Aldur 2 ára gomul, púra óbrúkt.
Tlf. 457230

TIL SØLU
Svørt leður hornasofa lítið brúkt til søluverði fyri 4.000 kr.
Tlf. 540924

SONG
hvít metal – 140 x 200 við boxmadrassu undirlagi og 2 náttborð – lítið brúkt.
Tlf. 321967

KEYPMANSDISKUR
Ein keypmansdiskur til sølu vegna umbroytan.
Tlf. 223580/212471

SONG TIL SØLU
Song 140 x 200, kommoda 6 skuffur, spegl og ymiskt.
Ring á 268253 ella 449906

TIL SØLU
Nakrar antik innihurðar, fyllingshurðar, seljast bíliga.
Tlf. 310901/510901 kl. 9-16

SJÓNVARPSBORÐ
Eitt sjónvarpsborð úr ljósum viði til sølu. 87 x 48.
Tlf. 370025

REOLSYSTEM
Eitt reolsystem við glasskápi, fløguhaldara og pláss til sjónvarp og video til sølu fyri bíligan prís. Tit kunnu ringja á
tlf. 226138, Annika

TIL SØLU
Ein boksmadrassa 160x200 + ein song 4 mdr. gomul til sølu fyri 1500 kr. Áhugað/ur ring
Tlf. 221123

ANTIKMØBLAR
Rustreyðir v/ beigelittum blomstrum, armleni útskorin: 3 mans sofa + 2 stólar til sølu.
Tlf. 224854

KAMARSETT TIL HJÚNARÚM
Gamaldags hvítt k.s. v/ útskornum blomstrum á: dupultsong, 2 náttborð, skáp og toiletmøbil v/ spegli til sølu.
Tlf. 224854

ANTIKK KOMMONDA
Við vippuspegli og trimum smáum skuffum báðumegin við speglið, er avsýnað træ, til sølu, um hóskandi boð fæst, ring og frætt nærri
Tlf. 318811

Lutaseðlar

LUTASEÐLARNIR
hjá Hondbóltsfelagnum Tjaldur. Hesir eru ikki heintaðir:
1) 2810. 3) 7339. 6) 3801.
12) 1883. 15) 7614 og 25) 9632.
Teir vinningar, ið ikki eru heintaðir innan 14. okt. fella aftur til felagið.
Hondbóltsfelagið Tjaldur, tlf. 441688/255155

HESI NR. VUNNU
á eyðuhjólinum/Fossánesi.
1) 8404 bláur, vunnin.
2) 26231 gulur, vunnin.
3) 403 bláur, vunnin.
4) 8454 bláur, vunnin.
5) 8423 bláur, vunnin.
6) 28282 gulur, vunnin.
7) 347 bláur, vunnin.
8) 26604 gulur, vunnin.
9) 354 bláur.
10) 24280 gulur, vunnin.
Tlf. 757575.
Bygdarfelagið Báran, í Árnafirði

HESI HAVA VUNNIÐ
lamb – lutakast/heimabingo:
Oddny Simonsen, Stangavegur 26, Klaksvík,
Ingeborg Olsen, Norðdepil,
Gertrud Justinussen, Árnafirði,
Jetta Yttesen, Sørvágur,
Joanita Johannesen, Spógvavegur Runavík,
Ella Petersen, Stangavegur 27, Klaksvík,
Elma Simonsen, Hvannasund,
Joan Andreasen, Skúlavegur, Klaksvík,
Bjarki O. Johannesen, Undir Gráasteini, Havn.
Jóna Joensen, Á Sondum 5, Sandavágur,
Helena Simonsen, Stangavegur 24, Klaksvík,
Marianna Ellefsen, Miðvágur,
Asta Højgaard, Heygavegur 71, Klaksvík,
Ingeborg Olsen, Norðdepil,
Jancy Eliasen, Vágsgeil 6, Klaksvík.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

LÍF-STUÐULSRENNING
23. sept. Hesi nr. vunnu eitt lamb hvør. Seðil nr. 39139 og nr. 16597. Vinnararnir eru funnin. Takk fyri stuðulin.
Nevndin

Matur

NAKRIR
nátaungar ynskjast til keyps.
Tlf. 225345

NAKRIR UNGIR TARVAR
til sølu, verða seldir sum heil ella hálv krov.
Tlf. 210028 ella 361459

KROV OG AVROÐ
kunnu billeggjast á
Tlf. 444847 ella 214847

NEYT TIL SØLU
Mjólkineyt, slaktineyt, kvígur og kálvar kunnu billeggjast á e-mail: rana@post.olivant.fo
Tlf. 282752

SEYÐUR TIL SØLU
Geldær, veðrar og lomb kunnu billeggjast á e-mail: rana@post.olivant.fo
Tlf. 282752

Pløgg

KAVADRAKT
Blá/svørt kavadrakt stødd 100 til søluverði fyri 100 kr.
Tlf. 317377

TIL SØLU
Einir hvítir konfirmatiónsskógvar std. 39 bíliga til sølu, bruktir eina ferð.
Tlf. 448173/218173 eftir kl. 18

KONFIRMATIÓNSKLÆÐIR
til drong til sølu, buksur, skjúrta og jakki.
Tlf. 319213

SKÓTABÚNI
stødd 12 ár, ynskist til keyps.
Tlf. 443007/243291

BRÚÐARKJÓLI TIL SØLU
Hann er sera vakur, einkul og brúktur í 8 tímar, str. 38.
Tlf. 312590

VAKUR BRÚÐARKJÓLI
Bíliga til sølu.
Tlf. 441573

Samband

SAMBAND YNSKIST
Til tín, ið var í dansi í Kollafirði leygardagin 27. sept. Tú siglir úti, og eg veit tú er einsamallur í dag. Eg vildi fegin, at tú skrivaði mær nakrar reglur, og tú skuldi fingið ein trúgvan vin fyri lívið, og annars ikki verið skuffaður á nakran hátt, tá vit siggjast. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1381/e

VIL TÚ BLÍVA MAMMA?
Eg vil gjarna blíva pápi, tí eg eigi einki barn – eri trúgvandi, royki og drekki ikki. Lat okkum líva saman og helst giftast, eg vóni tú svarar. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1682/1

Sjavs

SJAVSKAPPING
á Strondum sunnudagin 5. okt. kl. 16. Spælt verður nú um ein Apex ferðaseðil við Maersk til Danmarkar, sum verður drigin fyri jól
Strálan

Súkklur

KNALLERT YNSKIST TIL KEYP
Helst í góðum standi. Vinarliga ring
tlf. 372071/258438

YNSKIST
Ein dreingjasúkkla til 10-12 ára gamlan drong við uml. 21 gearum.
Tlf. 514797

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Yamaha FJ 1200, árg. 1991, prísur 67.000 kr.
Tlf. 424407

TIL SØLU
ein Aprillia RS 50
Tlf. 422331

TIL SØLU
Kreidler skutari, 3 ár, koyrt 5.000 km við lítlum breki. Til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 228347

MINIBANACROSS
Ein minibanacross til sølu fyri 9.000,- Koyrir ikki, men krevur lítið av ábøtum. Hon er 80 cc.
Tlf. 226880

DAMUSÚKKLA TIL SØLU
Winther kvalitetssúkkla v/ 3 kervum til sølu. Í góðum standi. Nýprísur: 3.200 kr. til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 321214 ella 211214

TIL SØLU
2 Puch Monza til sølu. Onnur fyri 3.000 kr. og hin fyri 4.000 kr. Nógvir deilir fylgja við.
Tlf. 210104

YNSKIST
Ein Aprilia RS 50cc fyri uml. 12.000 kr. Skal vera frá 98. Er í góðum standi. Ring
Tlf. 270255 ella 441635

MOTORSÚKKLUR TIL SØLU
Honda: CBX 750F, Honda Transalp 600, Kawa Z750, Kawa: GPZ 1000, Ducati: 750 Paco
Tlf. 372123 ella 504096

MOTORCROSS TIL SØLU
Er júst umvælt, í góðum standi.
Tlf. 318754 ella 506696

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum: